# Tveir trolarar landað á Sandi

**Roc Amadour og Eysturbúgvin syrgdu fyri, at sandoyingar hava havt nóg mikið at takast við seinnapartin í vikuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mikudagin landaði djúpvatnstrolarin, Roc Amadour, á Sandi. Teir høvdu umleið 90.000 pund av toski, hýsu og upsa.

Hósdagin landaði Eysturbúgvin. Teir høvdu 60.000 pund av upsa.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, sum partrola, hava hendan túrin verið í Skotlandi við tí hvíta fiskinum, og afturkomnir landaðu teir upsan í Føroyum.

Ein fittur partur av veiðini hjá bátunum var hýsa, sum hevur góðan prís í Skotlandi.

Vesturbúgvin landaði í Vestmanna.

Sum skilst, høvdu báðir bátarnir eini 250.000 pund tilsamans.




*Á virkjunum hjá Sandoy Seafood hevur fiskaarbeiði verið nøkulunda samanhangandi, hóast minni fiskur yvirhøvur er komin uppá land seinastu dagarnar*

### Samanhangandi

Hóast minni fiskur er komin uppá land í hesi vikuni, tí flestu skipini vóru inni í síðstu viku, hevur fiskaarbeiðið á virkjunum í Sandoynni tó verið rímiliga samanhangandi.

Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood, sigur, at tey arbeiddu allan mánadagin, tí fiskur lá niðurfyri frá vikuni fyri, og týsdagin arbeiddu tey hálvan dag.

– Mikudagin kom so Rock'urin og hósdagin Eysturbúgvin, sigur hann.

Í síðstu viku høvdu tey eisini eina hampiliga viku á Sandoy Seafood.

### Delta Seafood

Spurdur, hvussu gongur á Delta Seafood á Tvøroyri, har hann eisini er stjóri, sigur Magnus Jespersen, at fyrrapartin av hesi vikuni var heldur deydligt á virkinum, men seinna helvt hevur roynst betur.

# Næraberg farin nýggjan túr



*Í gjárkvøldið mynstraðu 23 konufólk og 57 mannfólk við Nærabergi, sum fór í føroyskan sjógv at royna eftir svartkjafti*

**Manningin hendan túrin telir 80 fólk, bæði kvinnur og menn, og skipari er Andor Isansen í Klaksvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hóskvøldið kl. 23 mynstraði manningin á Nærabergi í Klaksvík. Hendan túrin telir manningin 80 fólk, 23 konufólk og 57 mannfólk. Skipari er klaksvíkingurin, Andor Isaksen.

Næraberg fer í føroyskan sjógv at royna eftir svartkjafti, sum virkaður verður til surimi, fars og mjøl.

Hvussu langur túrurin verður, veldst um fiskiskapin, sigur reiðaríið, J.F.K-Trol í Klaksvík.

Skiparin, Andor, hevur siglt nógv ár við Skálabergi, men hevur siglt sum stýrimaður við Nærabergi, síðan skipið kom til landið.

### Sjúrðarberg við Svalbard

Sjúrðarberg hjá J.F.K-Troli er í løtuni á rækjuveiði við Svalbard. Tað eru einir 14 dagar, síðan teir fóru úr Føroyum.

Hvussu gongst hjá skipinum, veit reiðaríið lítið um at siga í løtuni, tí teir eru so norðarliga, at teir hoyrast ikki.

Sundaberg liggur í Klaksvík. Sum skilst, er kvotan eystanfyri uppi.

Fuglberg liggur á Skála.

# Nógvar landingar á Tvøroyri

**Nú landingarmiðstøðin í Vági bara tekur ímóti og selir útróðrarfisk, eru nógvar landingar á Fiskavirking á Tvøroyri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nógvar landingar hava verið til Fiskavirking á Tvøroyri hesa vikuna.

Mikudagin landaðu djúpvatnstrolararnir, Rankin og Steintór.

Rakin hevði sløk 140.000 pund. Av veiðini var 36.000 pund kongafiskur, 17.000 pund toskur, 16.000 pund upsi og 4 tons hýsa.

Steintór hevði sløk 240.000 pund; 92.000 pund var kongafiskur, 70.000 pund upsi, 40.000 pund toskur og sløk 16.000 pund hýsa.

Hjá báðum trolarunum var eisini eitt sløð av øðrum fiskasløgum.

Týsdagin landaði Brestir stívliga 180.000 pund. Meginparturin av veiðini hjá teimum var kongafiskur.

Akraborg og Varðborg landaðu mánadagin; teir høvdu ávikavist 40.000 og 47.000 pund í part. Av veiðini hjá Akraborg var meginparturin upsi og hýsa. Varðborg hevði næstan bara upsa, 34.000 pund tilsamans.

Aftrat hesum hevur garnabáturin, Nim, landað á Tvøroyri í vikuni. Teir høvdu 16.000 pund, meginparturin havtaska.



*Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey serliga arbeitt kongafisk og hýsu seinastu dagarnar*

### Mest kongafiskur

Martin Hentze, góðskuleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at nógvu landingarnar partvís skyldast, at landingarmiðstøðin í Vági bara landar og selir útróðrarfisk í løtuni.

Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey serliga tikið sær av kongafiskinum og hýsuni, meðan meginparturin av hinum fiskasløgunum er farin til onnur virki kring landið.

– Upsin fer í stóran mun norður um fjørðin, sigur góðskuleiðarin.



Náttúrugripasavnið og Jarðfrøðisavnið:

# Bjóða børnum á oljuframsýning

FRAMSÝNING
*Ragnhild Ellingsgaard*

*Náttúrugripasavnið og Jarðfrøðisavnið bjóða í hesum døgum føroyskum børnum á eina framsýning, har støðið verður tikið í oljuleiting í Føroyum*

Í heystfrítíðini hava Náttúrugripasavnið og Jarðfrøðisavnið bjóða fram eina framsýning, sum serliga er ætlað børnum. Framsýningin tekur støði í oljuleitingini í Føroyum, men eisini er okkurt leskiligt til børnini á skránni

Hóast heystfrítíðin kann tykjast long hjá summum, so er eingin orsøk til at sita framman fyri sjónvarpinum og keða seg.

Føroya Náttúrugripasavn og Jarðfrøðisavnið hava gjøgnum farnu vikuna havt eina framsýning á skránni, sum serliga hevur verið ætlað øllum teim børnum, sum hava notið eina viku uttan skúla og barnagarðar. Støðið hevur verið tikið í oljuleitingini í Føroyum, men børnini hava eisini fingið møguleika at vitja aðrar framsýningar.

Í framsýningini "Oljuleiting í Føroyum" hava børnini roynt sítt hugflog við ymsum uppgávum, og eisini hava tey havt møguleika at sett seg niður at tekna, um hugurin var til tess.

– Sum við øllum øðrum framsýningum er endamálið fyrst og fremst at vekja áhugan fyri tí, sum vit hava at bjóða fram á savninum, sigur Palli Askham, sum hevur verið við til at fyrireika hesa framsýning.

Hann leggur afturat, at talið av teim vitjandi hevur verið óvanliga stórt, og at áhugin hjá børnunum hevur verið serstakliga góður.

– Í miðal hava vit havt umleið 180 vitjandi um dagin. Og eftir áhuganum at døma, so ivist eg onga løtu í, at onkrir komandi oljuverkfrøðingar eisini telist millum hesi, sigur hann.



Framsýningin er skipað sum ein hugnaløta, har starvsfólk vegleiða børnunum, um tey hava okkurt at spyrja um.

Tá børnini eru vorðin móð av at ganga og hyggja, bjóða starvsfólkini teimum ein leskiligan Oljudropa frá Fóm og okkurt drekkandi frá PopTop, meðan foreldrini fáa kaffi og køkur.

Framsýningin er opin til og við fríggjadagin frá klokkan 13.00 til 16.00.

# P/F Snældan við Mentunnarpakkum

**P/F Snældan hevur júst givið út nýggja kollektión, sum ber heitið "Antartiska Kollektiónin". Samstundis bjoðar P/F Snældan eisini út ein nýggja Mentunnarpakka**

FRAMLEIÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*

Nýggja kollektiónin frá P/F Snælduni er longu komin út í handlarnar, og fæst sostatt til keyps hjá vanliga føroyinginum. Kollektiónin inniheldur mangt og hvat, bæði frakkar, stúkur og niðurdeilar.

Tað er Borgny Dam Patursson, sum hevur latið nýggju kollektiónina úr hondum. Borgny er kend fyri síni tíðarleysu og sermektu snið, og frá P/F Snælduni frætta vit, at nýggja kollektiónin eisini er nakað heilt serligt.

Samstundis er virkið eisini farið undir at framleiða ein Mentunnarpakka, sum skal kann fáast til keyps ymsastaðni í landinum.

Mentunnarpakkin er ein leypur, sum inniheldur eina føroyska troyggju frá Snælduni, eina fløgu við føroyskum fólka- og kvæðatónleiki, eitt postkort eftir kendum føroyskum listarmanni/kvinnu og til ábit ein vakuum pakkaðan føroyskan turran fisk.

Leypurin er tilevnaður á verkstaðnum Stíggi í Runavík, sum er dagliga tilhaldið og arbeiðssttaðið hjá teim menningartarnaðu í Eysturoynni, meðan fløgan "Den Yderste Ø" inniheldur yrkingar eftir William Heinesen, sum Kristian Blak hevur sett løg til.

Postkortini í pakkanum eru framleidd soleiðis, at pakkarnir, sum sendast skulu til Klaksvík, innihalda eitt postkort, sum er tilevnað av listarfólki í Klaksvík.

Endamálið við hesum er, at hvør staður í Føroyum fær eitt postkort, sum er tilevnað av fólki, sum á einhvønn hátt hava tilknýti til ávísa staðin.

Sambært faldara frá Snælduni hevur tú við Mentunnarpakkanum "møguleikan at ogna tær fleiri tættir av føroyskari mentan í einum. Mentunnarpakkin mettar bæði eygu, oyru og munn."

Diana Borgnýardóttir, sølu- og marknaðarstjóri á P/F Snælduni, greiðir frá, at hetta er fyrstu ferð, at slíkur Mentunnarpakki fæst í Føroyum.

# Ov fáir menn

**Pensionistafelagið í Havn kundi hugsað sær at sæð fleiri mannfólk tikið lut í virksemi teirra**

PENSIONISTATÍÐINDI
*Ragnhild Ellingsgaard*

Hvørt mikukvøld hittast pensionistar í Havn til eina lítla hugaløtu í Losjuni, har tey spæla kort, fara upp á gólv og hugna sær við ymsum spølum sum kinaskak, talv, ludo og øðrum. Onkuntíð fáa tey eisini vitjan av fólki, sum hava onkran forvitnisligan fyrilestur at siga teimum.

Umframt hetta skipar Pensionistafelagið eisini fyri einum bingo-kvøldið eina ferð um mánaðin, og tvær ferðir gjøgnum veturin verður ein hugnaløta løgd til rættis, har millum annað lutaseðlar fáast til keyps.

Seinastu tvey árini hevur eisini ein jólasøla við borðsølu, tombola og café verið á skránni, og hava hesar eydnast sera væl.

Eitt vikuskifti um árið plagar felagið at fara á ein dagtúr, sum limirnir tykjast vera sera glaðir fyri.

Í summar var Pensionistafelagið í Havn, saman við landsfelagnum fyri pensionistar í Danmark, á ferð í Danmark í eina viku. Hetta var ein sera væl eydnað vika, sum føroysku limirnir minnast afturá við gleði.

Vit frætta frá limun í Pensionistafelagnum, at heilt nógv fólk plaga at hittast til øll hesi tiltøk. Men meginparturin av limunum eru konufólk, og tí kundi felagið hugsað sær at sæð fleiri mannfólk teknað seg sum limir.

Sami býtistrupulleiki er eisini at finna úti á bygd, men í Pensionistafelagnum í Eysturoynni er heldur frægari.

Av tí sama ynskir Pensionistafelagið í Havn at heita á øll mannfólk um at støkka inn á gólvið, har teir kunnu verða við til onkra hugnaløtu.

At enda leggur felagið dent á, at Pensionistafelagið ikki er sama felag sum Tilhaldið, har opið er hvønn dag.